# um
# epparar



*Thorbjörg Hafsteinsdottir hevði gott tak á áhoyrarunum á Hotel Føroyum, tá hon vitjaði við sínum anti-age boðskapi miðskeiðis í mai*
*Mynd: Leif Láadal*

## ÚR ØLLUM LANDINUM

Í salinum siti vit við rund borð. Eini seks til átta við hvørt borðið. Summar eru komnar í felag, aðrar tvær og tvær, onkur einsamøll, og so eru tað sum sagt Sámal og eg. Allar síggja út til at hava tað í felag, at tær vita nøkulunda hvat tær eru komnar fyri at uppliva. Tá Thorbjörg tosar um kaltpressaða hørfræolju ella sexy morgun smoothies, nikka nógvar av teimum. Og tá tað snýr seg um pinjukjarnir og pilates er minst helmingurin av salinum á heimavølli.

Sjálvur havi eg størstan áhuga í sukurinum. Í skránni stendur, at Thorbjörg skal læra áhoyrararnar at "temja innara sukurtrøllið", og eg eri ikki tann einasti við hesum ynski. Tá hon tosar um hvussu torført tað er at koma av við hugin eftir ísi, sjokulátu, lakresi, gummibommum, køku og øllum hinum søta, nikka nógvar frúur so hart, at sjálvt ein risastórur bismarkbolli hevði verið í stórum vanda fyri at dottið úr munninum, um tær altso høvdu ein slíkan. Men tað hava tær ikki. Har er vatn á borðinum, og í steðginum er tað blandað frukt og stengur av gularót og agurku.

Nú er tað ikki tí, at eg kenni øll andlit í Havn, men tveir triðingar av áhoyrarunum eru um mín aldur – pluss/minus 10 ár – og eg skuldi kent tey flestu andlitini aftur, um tey væl at merkja vóru úr Suðurstreymi. Men tað geri eg ikki. Altso eru kvinnur komnar kropp á kroppi úr so at siga øllum landinum fyri at síggja fyrimyndina Thorbjörg Hafsteinsdottir. Og hon er eisini ein góð fyrimynd at hava. Sær sunn og deilig út, sjálvt um tað eru 50 ár og trý børn síðani hon varð gitin. Men soleiðis hevur tað ikki altíð verið.

## ALKOHOLISMA OG SUKURMISBRÚK

Thorbjörg vaks upp á bygd í Íslandi. Og tó at tað ikki búðu so nógv fólk í bygdini, so vóru ikki meira enn 150 metrar millum kioskirnar og pylsuvognarnar.

-Íslendingar eru ekstremistar á nógvum økjum, og tað gav eisini at býta, tá tað kom til matvanar, fortelur Thorbjörg.

Við hús fekk Thorbjörg skjótt ábyrgd av yngri systkjum, tí pápin var alkoholikari og mamman varð noydd at arbeiða hart. Thorbjörg gjørdi tí mat og reint við hús, og tá hon so endiliga hevði eina løtu fyri seg sjálva, fylti hon bomm og søtar sakir í seg.

-Tað var fyri so vítt einki nýtt, tí eg helt bara áfram við at gera tað, sum foreldur míni høvdu gjørt frá tí eg kann minnast: Fylla sukur í meg, fortelur Thorbjörg.

Longu sum seks ára gomul var hon tí at meta sum ein sukur-junkie, ið hevði torført við sita í frið í ein hálvan minutt, hevði ringt við at stýra sinninum, og tá hon seinni fór í skúla, fekk hon so at siga einki við av tí, sum roynt var at læra hana.

-Men hvussu skal tað vera, tá mann etur fylt fransbreyð til frokost, spyr Thorbjörg.

Og so fortelur hon, at